GÍ-B68 2-0 (1-0):

Toftamenn leita eftir sær sjálvum

Hóast teir høvdu bóltin nógv minni part av tíðini enn mótstøðumenninir, so vóru teir á GÍ liðnum meiri sannførandi frammanfyri málinum enn teir í B68

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

B68 hevur verið langt við síðuna at sær sjálvum síðani summarsteðgin, og mest av øllum munnu tey á Toftum fegnast um, at tað hóast alt eydnaðist at skava sær heilt fitt av stigum saman undan summarsteðginum
Mynd: Jonhard Hammer

Eingin endi tykist vera á oyðimarkagongdin hjá B68. Hesa ferð vóru teir í Gøtu. B68 var spælstýrandi mittasta tíman, og teir spældu seg til hálvar møguleikar og meiri enn tað. Men teir megnaðu ikki at fáa mál. Tað gjørdi heimaliðið, og síðani útisigurin á Skála 3. juli hevur B68 verið annar parturin í seks landskappingardystum, uttan at tað hevur eydnast teimum at vinna.

Tá úrtøkan er so soltin, er tað so skjótt, at liðið verður nógv broytt frá dysti og til dyst, og soleiðis var tað eisini hesa ferð. Hans Fróði Hansen var leikbannaður, og tí vóru Oleif Joensen og Fróði Benjaminsen í miðverjuni í 1. hálvleiki. Eftir steðgin, tá tað skuldi verða meiri álopsrættað, tí GÍ var á odda, varð Fróði fluttur fram á miðjuna, og Messias, sum hevði verið vongverji í vinstru, varð fluttur inn á plássið í miðverjuni, sum tykist vera mest náttúrligt hjá honum at spæla í.

Fríðin Ziskason var so mikið skaddur, at hann fekk ikki spælt. Tað hevði við sær, at Marlon Jorge aftur var sloppin upp í part. Bogi Petersen, sum hevur verið á miðvøllinum síðani summarsteðgin, var hesa ferð á vongverjanum í høgru, har Jan Petersen, sum hesa ferð var skaddur, plagar at vera, og John Heri Dam, sum hevur verið vongverji, var hesa ferð á álopinum í vinstru, meðan Øssur Hansen var miðvallari.

Nøgvu rokeringarnar tóktust ikki bíla á tann hátt, at burtursæð frá fyrsta og síðsta koretrinum var tað B68, sum var spælførandi. Teir megnaðu at spæla seg til hálvar møguleikar, men teir fingu ikki bóltin framvið Mortani Joensen, sum avloysti skadda Hall Hansen í GÍ málinum. Og kring vøllin var kenslan, at um teir so høvdu spælt í fleiri tímar, so er støðan nú soleiðis hjá toftamonnum, at tað ikki hevði eydnast teimum at fáa mál.

Ein tann besta møguleikan fekk Arnold Joensen, tá hann kom ímillum afturlegging frá Leivi Hansen, men vandamikla støðan gav einki. Anders Nygaard, sum í fyrstu umførunum tóktist skula verða stórur álopsfongur hjá B68, var enn eina ferð við síðuna av tí, sum hann vísti fyrstu umførini.

GÍ góða úrtøku

Gøtumenn hava vunnið báðu ferðirnar, síðani teir fyri trimum vikum síðani á heimavølli mistu FM møguleikan ímóti HB. Burtursæð frá at teir vóru noyddir at skifta málverja, og at Hans Pauli Petersen ikki var við, so vóru teir í útgávuni, teir hava verið í seinastu vikurnar.

Fyrsta korterið var GÍ avrikið so gott, sum tað kanska ikki hevur verið fyrrr í ár. Tað var sum í gyltua tíðarskeiðnum í níti árunun. Burturúr yvirvágini fekk GÍ eitt mál. Popczynski sneiddi framvið fleiri í vinstru, áðrenn hann stakk inn um verjuna til Súna Olsen, sum sendi framvið B68 málverjanum.

So var tað leingi torført hjá heimaliðnum í Sarpigerði, og í ein tíma ella so var kenslan tann, at tað fór at verða sera torført at fáa øll stigini. Men tað eydnaðist at halda tætt, og tá toftamenn noyddust at sleppa alt meiri í verjupartinum, kom málið, sum tað kundi roknast við. Men tað var GÍ, sum fekk tað.

Súni Fríði Johannesen krúllaði mitt fyri í brotsteiginum, og skotroyndin brast í stólpan. Gidek var fyrstur á returbóltinum og legði bóltin í málið. So ráddi um at varðveita trivaligu leiðsluna. Tað var ikki nakar trupulleiki hjá gøtumonnum, sum við sigrinum framvegis tevja altjóða luttøku.

Á Toftum er lítið at fegnast um. Undan summarsteðginum eydnaðist at skava nógv stig saman. Hevði úrtøkan tá verið, sum hon hevur verið síðani summarsteðgin, hevði liðið nú verið í niðurflytingarvanda!

Dysturiní tølum

GÍ-B68 2-0 (1-0)
1-0: Súni Olsen 14
2-0: Zdzislaw Janik 75
Dómari: Oddmar Andreasen

GÍ: Mortan Joensen – Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen – Magni Jarnskor, Sámal Joensen, Zdzislaw Janik, Súni Olsen, Bárður á Lakjuni – Súni Fríði Johannesen, Krzystof Popczynski
B68: Michal Kokoszanek – Bogi Petersen, Fróði Benjaminsen, Oleif Joensen, Messias Perreira – Marlon Jorge, Jann Ingi Petersen, Øssur Hansen – Arnold Joensen, Anders Nygaard, John Heri Dam

ÍF-VB 3-1 (0-1):

ÍF og VB áttu hvør sín hálvleik

Vágbingar kunnu bert takka sær sjálvum fyri, at teir ikki fingu eitt betri úrslit í Fuglafirði leygardagin. Í fyrra hálvleiki hevði VB eitt hav av opnum møguleikum, sum burdi viðført eina størri hálvleiksleiðslu. ÍF vaknaði í seinni hálvleiki, sum gjørdist eitt langt álop á VB-málið

2. DEILD
Jákup Mørk

Sum alla aðrastaðni har dystir í 2. deild vóru spældir, var stórur spenningur í Fuglafirði. Tapandi liðið vildi verið illa fyri, og tí var umráðandi at fáa ein sigur í hús. Deildin hevur at kallað alt ár verið sera jøvn, og eftir dystirnar leygardagin, er spenningurin bara blivin størri.

Upplagdir møguleikar

Dysturin millum ÍF og VB gjørdist ein dystur har liðini áttu hvør sín hálvleik. Tó var ÍF leikliga við yvirlutan samanumtikið, men málmøguleikar hevði VB minst líka nógvar sum ÍF - um ikki fleiri.

ÍF byrjaði heldur varliga, og tí fekk VB heldur óvæntað nógv pláss á spæla á. ÍF hevði lítið at bjóða uppá fyrstu løtuna av dystinum, og bert hendinga møguleikar komu burturúr.

VB royndi seg við longum sendingum fram til Birgir Jørgensen, og hetta vísti seg at verða eitt einkult men vandamikið vápn. Tí vágbingar komu fram til nógvar heilt stórar møguleikar, og at tað tóktist løtt at koma ígjøgnum verjuna hjá ÍF í fyrra hálvleiki. Men vágbingar vóru ikki avgjørdir nokk, og tí fingu teir ikki skorað upp á upplagdu møguleikarnar.

Sum fyrri hálvleikur leið kom ÍF meira við, og leikliga vóru teir omaná móti endanum.

Men so fekk VB enn ein møguleika. Gisli Sveinbjørnsson fór ígjøgnum verjuna hjá ÍF og hesuferð eydnaðist at fáa bóltin framvið málverjanum og í mál. Fyrri hálvleikur endaði við 1-0 til VB, og tað var fult uppiborið.

Einvegis ferðsla

Seinni hálvleikur var eitt stórt tryst á VB-málið. ÍF setti ferðina upp og samstundis fekk VB als ikki spælið at hanga saman. Men hóast trýstið frá ÍF, so bleiv tað til skotroyndir útifrá sum flestu fóru við síðuna av.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki bleiv Heini Heinason skiftur inn, og tað skuldi vísa seg at verða ein skilagóð innskifting.Ferð eftir ferð slapp hann ígjøgnum í vinstru síðu, og innleggini frá honum vóru eisini vandamikil. Tá eitt korter var eftir at spæla, kom tað fyri ÍF forloysandi málið til 1-1. Ein bóltur bleiv spældur innfyri úr høgru síðu, og har var Heini Heinason síðstur á bóltinum og setti hann í mál.

Fuglfirðinar vóru reiðiliga omaná leikliga, og spurningurin var bara um VB megnaði at halda javnleikinum tað sum eftir var.Tí spælið hjá vágbingum í seinna hálvleiki minti lítið um fótbólt.

Tríggjar minuttir fyri tíð, fekk ÍF fríspark beint uttanfyri brotsteigin hjá VB. Høgni Zachariasen setti við einum frálíkum skoti bóltin beinleiðis í mál. Og tað skuldi ganga enn verri hjá VB, tí ÍF fekk eitt mál aftrat í seinasta minutti, og aftur var tað Heini Heinason sum fekk bóltin inn um málstrikuna.

ÍF vann sostatt ein týdningarmiklan sigur uppá ein góðan seinna hálvleik. Vágbingar kunnu hinvegin iðra seg um,at teir ikki kendu sína sviptunartíð tá møguleikarnir vóru har.

Dysturin í tølum:

ÍF-VB 3-1(0-1)
0-1: Gisli Sveinbjørnsson
1-1: Heini Heinason
2-1: Høgni Zachariasen
3-1: Heini Heinason

Súkkluárið liðugt

Tórshavnar Súkklufelag skipaði í vikuskiftinum fyri FM í súkkling

SÚKKLING
Tíðindaskriv

Gunnar Dahl-Olsen gjørdist stóri vinnari, tá punktum um vikuskiftið varð sett fyri súkkluárinum

Tríggjar vóru kappingarnar, og fóru tær fram hósdagin, fríggjadagin og leygardagin. hósdagin stóð býarsúkkling á skránni. súkklað bleiv í 45 min. + 1 umgang. Teinurin var hin sami sum á Ólavsøku, tá súkklað varð uppi á Hálsi í Havn.

Gunnar tók alt

Gunnar Dahl-Olsen vann ein tryggan sigur, men spenningur um 2. plássið var til seinasta sekund. Hans Krosstein úr Klaksvík var væl fyri og megnaði í endaspurtinum at fara fram um Eli Christiansen, ið mátti taka til takkar við einum 3. plássi.

Fríggjakvøldið stóð FM í 30 km tíðarsúkkling á skránni. Leiðin gekk úr Havnini til Kaldbaks og aftur til Havnar. Veðrið var av tí fagrasta, sólin skein og stilli. Møguleikar vóru tí fyri góðum úrslitum. Tað bleiv tað eisini til hjá Sverra og Gunnari, ið báðir megnaðu at seta nýggj persónligt met. Ikki nokk við tí, tíðirnar vóru ikki langt frá føroyska metinum hjá Rógva Johansen, ið er 41 minuttir og 5 sekundir.

Gunnar vann við 42 minuttum og 8 sekundum. Sverri brúkti 42 minuttir og 55 sekundir um teinin. Beinir Rasmussen gjørdist nr. 3.

Finalan

Leygarmorgunin skuldu súkklararnir aftur upp á saðilin. Tá skuldu føroysku súkklararnir kappast í 100 km felagsstarti.

Leiðin gekk av Toftum, um Eiðisskarð, fram við Sundalagnum, og so eftir Oyggjarvegnum til Havnar. Komnir til Havnar skuldu tvey umfør koyrast runt í býnum. Komnir oman av Oyggjarvegnum gekk leiðin niðan eftir Sundsvegnum, oman eftir Vegnum Langa, eftir Hvítanesvegnum, har málið var við Skógrøkt Landsins.

Sverri M. Edvinsson, Eli Christiansen, Beinir Rasmussen og Gunnar Dahl-Olsen fylgdust upp um Eiðisskarð og suður gjøgnum Sundalagið. Í brekkuni niðan úr Hósvík rykti Sverri frá hinum. Gunnar fekk beinanvegin fatur á Sverra. Brekkan gjørdist ov drúgv hjá Sverra, og Gunnar slap leysur av honum. Sverri gjørdi alt fyri at fáa Gunnar aftur og Gunnar sitt fyri at sleppa undan Sverra. Tað eydnaðist, og tá leiðin gekk niðan á Oyggjarvegin var Gunnar 1 min. framman fyri Sverra. Munurin øktist og øktist og tá avtornaði vann Gunnar á Sverra við 10 minuttum. Eli og Beinir fylgdust við Kollafjaðrar, har Beinir steðgaði tí hann fekk krampa. Hetta hendi honum fýra ferðir til Havnar, og seinkaði honum einar 7 minuttir, sum tó ikki høvdu verið nokk til at fara fram um Eli, tí hann súkklaði henda seinasta teinin 16 minuttir skjótari enn Beinir.

Elsti og yngsti súkklararnir á FM 100 km teininum henda dagin, Evald Rasmussen og Hans Krosstein, máttu lata hinar fara í Funningi, teir fylgdust so allan vegin til Havnar, har teir avgjørdu sínamillum kappingina í einum spurti, og vann Hans við einari súkklulongd.

Nú er so kappingarárið 2002 hjá Tórshavnar Súkklufelag at enda komið, tó ikki liggur felagið stilt í vetur. 2003 er Oyggjaleikaár, og verður veturin eisini brúktur til fyrireikandi venjingar, eitt nú við innandura súkkling, sokallað spinning.

FM býarsúkkling.
1 Gunnar Dahl-Olsen,
2 Hans Krosstein,
3 Eli Christiansen
4 Evald Rasmussen
5 Dánjal Michealsen
6 Bergur Johansen

FM 30 km tíðarsúkkling:
1 Gunnar Dahl-Olsen, 42 minuttir 8 sekundir
2 Sverri M. Edvinsson, 42,55
3 Beinir Rasmussen, 46,43
4 Eli Christiansen, 47,40
5 Hans Krosstein, 50,46
6 Esmar Joensen, 51,01
7 Evald Rasmussen, 53,30
8 Dánjal Michealsen, 54,57
9 Bergur Johansen, 57,53

FM 100 km:
1 Gunnar Dahl-Olsen, 3 tímar 23 minuttir
2 Sverri M. Edvinsson, 3 t. 33 min.
3 Eli Christiansen, 3 t. 40 min.
4 Beinir Rasmussen, 3 t. 56 min.
5 Hans Krosstein, 4 t. 16 min.
6 Evald Rasmussen, 4 t. 16 min.

B36-FSV 0-2 (0-2):

Tryggir vágamenn

FS Vágar halda framvegis kósina, og leygardagin gjørdist talan um enn ein sigur til einaráðandi oddaliðið

Vágamenn staðfestu leygardagin, at teir hava nógv tað besta liðið í deildini, og sigurin á næst fremsta liðnum í deildini var ongan tíð í vanda
Mynd: Álvur Haraldsen

2. DEILD
Jákup Mørk

Tosið í Vágunum snýr seg sjálvandi framvegis um fótbóltin, har felagsliðið í oynni longu hevur tryggjað sær uppflytingina. Í hesum døgum er tað tó ikki so nógv stigatalvan, sum tosið snýr seg um. Heldur eru tað tey, sum bera ótta fyri, at vágamenn skulu fáa alt ov nógv mál, tí soleiðis sum árið hevur háttað sær, hevur tað verið ein dýr uppliving hjá teimum, sum teknaðu málpartabrøv undan kappingarárinum.

Í so máta sluppu tey tó hampuliga bíliga, tá FS vitjaði B36, sum undan dystinum var á næst fremsta sessinum.

Tað var kanska væntandi, at talan skuldi gerast um ein sera javnan dyst, men fyrst og fremst sýndi hetta, at tað er stórur munur á FS Vágum og so hinum í deildini. Gaman í kom sigurin til høldar við tveimum brotssparksmálum, sum Jens Erik Rasmussen sendi í kassan, men yvir høvur høvdu gestirnir tamarhald á í samfullar 90 minuttir.

Sum sagt, so var sigurin ein staðfesting av, at vágamenn hava so nógv tað besta liðið í deildini í ár, men hinvegin staðfesti hetta eisini, hvussu jøvn restina av liðunum í deildini er. B36 er – hóast tapið - framvegis á silvurplássinum í deildini, men tað skal tó ikki nógv kiksa, fyrr enn hetta er mist.

Við tveimum dystum eftir er munurin niður til sjeynda plássið bert tvey stig, so enn er so langt ífrá víst, at talan verður um heiðursmerki av nøkrum slag, hóast liðið hevur verið í topp-3 størsta partin av tíðini eftir summarsteðgin.

B36-FSV 0-2 (0-2)
0-1: Jens Erik Rasmussen (br.)
0-2: Jens Erik Rasmussen (br.)

LÍF-NSÍ 4-0 (1-0):

Lívsneyðug stig til Leirvíkar

LÍF vann grannauppgerðina móti NSÍ, og fluttu seg trý pláss uppeftir á stigatalvuni, men enn er hvørki leyst ella liðugt

2. DEILD
Jákup Mørk

Tað stóð einki til við fótbóltshýrinum í Leirvík undan dystinum móti teimum næst bestu úr Runavík. Fótbóltsliðið hjá bygdini var undan hesum dottið aftur á trið niðasta sessin, og vandi var fyri at detta enn longur, um talan ikki gjørdist um trý stig leygardagin.

Runavíkingar hava í ár verið svingandi í avrikum sínum. Fyrstu umførini vóru teir mest sum fastir í botninum, men síðani hevur gingið stútt framá, og við einum sigri kundu teir av álvara leggja seg út í oddastríðið.

Soleiðis skuldi tó ikki ganga, tí LÍF vann ein tryggan sigur, tó at spenningurin um dystin leingi hekk í luftini. Í steðginum var tað soleiðis bert einsamalla málið frá klaksvíkinginum, Símun W. Høgnesen, sum skilti partarnar.

Eftir steðgin kom tó annað lag á. Framvegis vóru tað leirvíkingar, sum vóru omaná, og nú fingu ini væl og virðiliga løn fyri stríðið. Fyrst økti Petur Sjúrðarberg um munin, áðrenn Fróði Joensen við tveimum málum slerdi sigurin rimmar-fastan og sendi LÍF upp á fimta plássið á stigatalvuni og mitt í meira ella minni inn í uppflytingarstríðið.

Her kann LÍF nevnliga enn hava eitt orð á siga. Bert eitt stig er upp til B71, sum er fremsta lið av teimum, sum kunnu fylgja vágamonnum upp í bestu deildina, og júst B71 kemur á vitjan í Leirvík komandi vikuskiftið. Og tað er lítið at ivast í, at fótbóltsfepurin undan tí dystinum verður fleiri stig hægri, enn hann var hesaferð.

Runavíkingar skulu hinvegin ansa sær, skulu teir ikki detta úr deildini. Tapið hesaferð merkti, at teir duttu aftur á áttanda plássið. Komandi vikuskifti fáa teir vitjanin av B36, sum stríðist fyri silvurkrónunum.

Dysturin í tølum

LÍF-NSÍ 4-0(1-0)
1-0: Símun W. Høgnesen
2-0: Petur Sjúrðarberg
3-0: Fróði Joensen
4-0: Fróði Joensen